# Danir til Onglands eftir ummæli av føroyskari opera



Frálíka ummælið av operaini hjá Sunnleifi Rasmussen, Í Óðamansgarði, ið herfyri varð prentað í bretska blaðnum The Times, er nú prentað á donskum.

Tað er danska tónleikatíðaritið Dansk Musik Tidskrift, ið hevur umsett ummælið hjá Hillary Finch. Í ummælinum gav Finch operaini 4 út av 5 stjørnum, í donsku útgávuni eru stjørnurnar ikki umsettar, men øll tey jaligu orðini eru enn við.

Í ummælinum rósar hon millum annað teimum báðum Gunnvá Zachariasen og Hans Torgarð fyri sannførandi avrik. Eisini dirigenturin Bernhard Wilkinson fær rós fyri sítt megnaravrik uttan orkestur grøv og í sambært Finch miðalhampa akkustikki.

**nud**

# Ákos spældi føroyskan tónleik í Ungarn



Á miðdegi í gjár hevði ungarski føroyavinurin Ákos Istvan Posta eina sending á landsumfevnandi ungarsku útvarpsstøðini Magyar Katolikus Rádió.

Í sendingini, ið varð send kl. 12.30 á útvarpsrásini spældi Akos trý føroysk løg. Vit hava ikki frætt hvørji løg hann spældi, ella hvat sendingin snúði seg um.

Ákos var í Føroyum í summar og vitjaði, hann arbeiðir við at skriva ikki færri enn tvær bøkur um Føroyar.

**nud**

# KROSSORÐ




## Vinnari:

*Finn Bjørn Guttesen*
*Rugårdsvej 215, 1*
*5210 Odense*

## Loysnin frá seinastu viku
## Loysunarorðið: JAVNLÍKARNIR

| | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| J | Ó | L | A | M | Á | N | A | Ð | U | R | I | N | | Á | R |
| Ó | V | I | N | I | R | | | | M | Á | S | I | N | | Æ |
| L | I | V | I | L | I | G | T | | | S | I | R | I | U | S |
| A | R | V | A | | N | U | R | M | I | | | V | E | | T |
| S | K | I | K | K | I | L | I | G | I | R | | A | L | M | U |
| T | I | | | A | Ð | A | L | | | D | A | N | S | A | R |
| Á | N | A | R | I | | T | V | | O | L | G | A | | R | F |
| K | | R | A | | M | I | A | | R | | A | | Á | S | I |
| A | N | N | F | I | N | N | | H | Ø | S | M | Ø | L | | S |
| N | E | O | N | | | G | K | | | S | E | L | V | Í | K |
| 488 | M | L | | N | A | | A | G | N | | M | | | T | U |
| L | U | D | D | I | | A | I | | E | I | N | G | L | A | R |
| U | S | | I | Ð | R | A | N | | | L | O | G | O | S | |
| N | | A | A | A | | | | K | Ø | L | N | | | T | A |
| I | V | I | | R | O | K | N | A | Ð | I | | F | E | I | L |
| K | A | S | S | I | O | P | E | I | A | | S | M | U | R | T |

## Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. ...« á bjálvan.

**Loysunarorðið:** ........................................... **489**

Navn: ..............................................................

Bústaður: ......................................................

Bygd/býur: ....................................................

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ☐ **Okkara kokkar** – *Gudmund Gudmundsson*
- ☐ **Grund 1** – *Steinbjørn B. Jacobsen*
- ☐ **Ein farri av kolvetni** – *Marjun Kjelnes*
- ☐ **Veður og tíðindi í Føroyum 1875–2002** – *Petur Skeel Jacobsen og Finnbogi Ísakson*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ☐ **Heimsatlas**
- ☐ **Føroysk Flora** – *Jóhannes Jóhansen*
- ☐ **Havið** – *Bogi Hansen*
- ☐ **Heimsins lond**
- ☐ **Grót og steinar** – *Martin Heinesen týddi*

***Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt***